# Teitur og Sigrid syngja fyri føroyingum Bretlandi



*John Rajani, føroysku sendimaður í London hevur tikið stig til saman við øðrum at fáa føroyingar í Bretlandi savnaðar*



*Sigrid Rasmussen fer at syngja, tá einir 100 føroyingar koma saman í London týskvøldið*



*Teitur Lassen verður við til samkoma í London týskvøldið*

**FØROYINGAR Í ÚTLANDINUM**
*Jan Müller*

Føroyskur viðskeri, føroyskur tónleikur og sangur og føroysk olja verða á skránni, tá einir 100 føroyingar búsitandi í Bretlandi hittast til hugnaliga samveru í London týskvøldið. Tað er FISC, Faroe Island Solidarity Commitie og føroyski sendimaðurin í London, John Rajani, sum hava tikið stig til tiltakið. Endamálið er fyrst og fremst at savna so nógvar føroyingar í Bretlandi saman sum tilber. Tað verður mett, at einir 500 føroyingar og 2. ættarlið eru í Bretlandi. Koma 100 til samkomuna verður tað hildið at vera gott.

Hóast tað kann vera langur teinur at fara til London úr nógvum pørtum av Bretlandi, so kann tað tó løna seg at gera túrin. Tí til samkomuna verður høvi at hitta aðrar føroyingar og fáa føroyskan mat, øl og annars undirhald. Og er tað undirhald av 1. floks góðsku eins og maturin og ølið. Tvey av okkara frægu tónlistafólkum, Teitur Lassen og Sigrid Rasmussen fara at spæla og syngja. Men ætlanin er so eisini at seta eitt ávíst aktuelt evni á skránna. Tað er samstarvið millum Føroyar og Bretland, og tað eru útlitini fyri eini føroyskari oljuvinnu, har m.a. Eyðun Elttør, landsstýrismaður fer at røða.


## Tríggjar síður av somu søk

Vit á Føroya Tele eru púra greið yvir, at tað stundum kann vera ringt at velja. Men vit vilja fegin, at tú fært júst tað haldið til fartelefonina, ið hóskar til títt brúk. Tí skapa vit gjøgnumskygni í valmøguleikarnar.

| KOSTNAÐUR | GSM FRÍTÍÐ | GSM VANLIGT | GSM VINNULIGT |
|---|---|---|---|
| Stovning | 0,- | 0,- | 0,- |
| Mánaðargjald | 40,- | 115,- | 200,- |
| Samrøður - dag | 2,25 min | 1,90 min | 1,50 min |
| Samrøður - kvøld | 0,75 min | 1,15 min | 1,50 min |
| SMS-boð | 0,50 | 0,75 | 0,75 |

| TÆNASTUR | GSM FRÍTÍÐ | GSM VANLIGT | GSM VINNULIGT |
|---|---|---|---|
| Boðtænasta | ✓ | ✓ | ✓ |
| Boðtænasta, víðkað | - | - | ✓ |
| Boðtóni | - | ✓ | ✓ |
| Parkering | - | ✓ | ✓ |
| Fleirpartasamrøða | - | ✓ | ✓ |
| Víðaristilling | | ✓ | ✓ |
| Vís nummar | + | + | ✓ |
| Sperr av sjálvvali | - | + | ✓ |
| Loysa sperr til útland | + | - | - |
| Dátuflutningur | - | + | ✓ |
| Wap | ✓ | ✓ | ✓ |
| Samrøðuútgreining | + | ✓ | ✓ |

✓ : Er við í haldinum + : Kann stovnast - : Kann ikki stovnast



Ókeypis stovning er galdandi til 1. mai. Fyrivarni verður tikið móti prentvillum.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum





